Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 16. desember 2005



**Jólagøtan 22**

Hvønn fer Lív at hitta úti á Reyni í kvøld? Og man hon fara at fáa okkurt at verma seg við? Spennandi verður at vita, hvørjar jólagávur børnini hava gjørt. Ein hugnaløta í Jólagøtuni saman við Lív og øllum hinum. Jólaaftan verður í ovurmorgin og Lív gleðir seg! **Hósdag 22. kl. 18.00**




**Heimsins bestu dokumentarfilmar: FC Barcelona**

Í juni í 2003 taka nakrir vinnulívsmenn og IT fólk leiðsluna í heimsins størsta fótbóltsfelag, spanska FC Barcelona. Ikki tí at tað gongur væl í felagnum, tað er um at fara á húsagang og liðið hevur ikki vunnið nakað heiti í langa tíð. Men tað lýsnar so smátt, tá Joan Laparta og nýggja leiðslan fara undir at umskipa felagið.
**Mikudag 21. kl. 20.55**

**My Fair Lady**

Málgranskarin og professarin Higgins hittir eitt illveðurskvøldið bygdagentuna Eliza uttanfyri sjónleikahúsið í Covent Garden í London. Hann setir sær fyri at læra Elizu at tosa meiri hábærsliga, soleiðis, at hon kann koma í tað fínara vertsskapi, sum hertugafrúa. Klassiski amr. sangleikurin frá 1964 við Audrey Hepburn og Rex Harrison.
**Sunnudag 18. kl. 14.15**

Televarpið
Fleiri rásir - einki roks
**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**